# Ómenniskjalig krøv hjá ALS

**- Skal eg fygja treytunum hjá ALS, má eg seta sonin hjá mær á trappusteinin á ansingarstovninum til tey lata upp, so eg kann fara til arbeiðis. Hetta sigur ein ung kvinna, sum ALS ikki metir vera tøka á arbeiðsmarknaðinum, tí hon ikki hevur barnaansing kl. 6 á morgni**

ARBEIÐSLOYSI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Reglurnar í ALS skipanini gera tað nærum ógjørligt hjá fólki við smáum børnum at koma í arbeiði aftur. Óbeinleiðis tykist tað sostatt sum, at skipanin er við til at fasthalda fólki í arbeiðsloysinum, heldur enn at hjálpa teimum úr tí.

Hetta er niðurstøðan hjá tveimum arbeiðsleysum kvinnum, Sosialurin hevur tosað við. Báðar hava tær gjørt alt fyri at kunna átaka sær tey størv, ALS hevur boðið teimum, men ALS er ikki til at vika. Megna tær ikki at fáa onkran at ansa børnunum, uttanfyri vanliga upplatingartíð hjá ansingarstovnunum, eru tær ikki longur tøkar á arbeiðsmarknaðinum. Onnur er tískil koyrd úr skipanini og er nú undir Almannastovuni. Hin bíðar á fjóðru viku eftir svari uppá skrivligu frágreiðingina, ALS hevur kravt frá henni. Men mest sannlíkt er tað, at eisini hon hevur útlit til at gerast almannaklientur innan leingi.

### Skilur onki

– Eg havi greitt ALS frá, at skal eg fylgja teirra treytum fyri at koma í arbeiði, má eg seta son mín á trappusteinin á ansingarstovninum, har hann kann sita og bíða, til starvsfólkini koma til arbeiðis og taka hann inn tveir tímar seinni. Hetta sigur ein 30 ára gomul kvinna, sum varð biðin um at átaka sær eitt starv, har hon skal byrja kl. 6 á morgni mánadag og kl. 7 hinar dagarnar í vikuni.

Kvinnan gjørdist meir enn fegin, tá hon fekk arbeiðsboð frá ALS eftir at hava gingið arbeiðsleys í 3 mánaðir. Hon gjørdi beinanvegin alt, hon kundi, fyri at fáa lítla sonin ansaðan teir tímarnar, áðrenn ansingarstovnurin letur upp. Tað eydnaðist lutvíst, men ongin var, sum kundi ansa dronginum kl 6 mánamorgun. Hetta fekk ALS boð um, og dagin eftir fekk kvinnan at vita, at øll útgjøld frá ALS harvið steðgaðu. Samstundis varð hon biðin um at koma við eini skrivligari frágreiðing um, hví hon ikki kundi átaka sær tað arbeiðið, hon hevði fingið bjóðað.

– Eitt tað fyrsta, eg gjørdi, tá eg kom inn í skipanina, var at fylla eitt oyðiblað út, har eg upplýsti um mínar umstøður. Eg má siga, at eg nú havi sera ilt við at skilja, hví eg skuldi koma við teimum upplýsingunum, tá teir nú kortini eru púra óviðkomandi. Eg skilji heldur ikki, hví ALS yvirhøvur bjóðaði mær hatta arbeiðið, tá tey frammanundan vóru púra greið yvir, at eg ikki kundi átaka mær tað, sigur kvinnan.

### Bróta barnaverndarlógina?

– Tað eru nú fýra vikur síðani, eg sendi skrivligu frágreiðingina, men eg havi onki hoyrt enn. Tað tók ALS 25 tímar at boða mær frá, at eg ikki longur fekk nakað útgjald. Tí tykist tað ógvuliga løgi, at tað skal taka fleiri vikur at taka støðu til nakað so einfalt, sum at eg onga barnaansing havi, og sum eg longu havi greitt teimum frá fleiri ferðir, undrast kvinnan.

Kvinnan bíðar sostatt framvegis eftir at fáa at vita, um hon fær karantenu frá ALS ella heilt verður koyrd úr skipanini. Hon ivast sostatt eisini í, um hon kann loyva sær at venda sær til Almannastovuna, so leingi, hon ikki veit, hvør niðurstøðan hjá ALS verður.

– Eg gangi nu í einum ongamannalandi og bíði og havi góðar stundir til at undra meg yvir, hvørji menniskju lógirnar í hesum landinum í grundini skulu verja. Hvørja ferð eg komi við eini grundgeving, kann ALS vísa á eina lóg ella paragraff, sum staðfestur, at mín orsøk ikki er nóg góð. Eg kundi sjálvandi gjørt álvara av tí og sett sonin á trappusteinin hjá ansingarstovninum. So havi eg brotið barnaverndarlógina og missi kanska sonin, so møguliga kann eg tá koma undir paragraffina hjá ALS, sum snýr seg um undantøk, sigur kvinnan beiskliga.

### Gjørdist almannaklientur

Hin kvinnan slapp í fyrsta umfari ikki inn í ALS skipanina, tí hon var uppá vegin. Heldur ikki hon var mett at vera skikka til at vera í skipanini, tá hon kortini skuldi í burðarfarloyvi 4 mánaðir seinni. Seinni varð hendan avgerðin hjá ALS tó ógildað. Kvinnan er nú aftur tøk á arbeiðsmarknaðinum, men ikki nóg tøk til at koma inn í arbeiðsloysisskipanina sambært reglunum hjá ALS. Hon varð nevniliga koyrd úr skipanini, tí hon varð noydd at siga nei til eitt starv frá 17 til 21 á kvøldi, tí hon ikki hevði barnaansing.

– Tá eg meldaði meg inn í ALS, var tað tí mítt hægsta ynski er at koma aftur í arbeiði. Eg haldi meg hava roynt alt fyri at fáa tað at bera til, men krøvini eru nærum ómenniskjalig, so tíverri var tað ikki nokk. So í staðin fyri fáa eitt arbeiði gjørdist eg almannaklientur – og tað var ongantíð meiningin, sigur kvinnan.

---

Stjórin í ALS:

# Tilboðini endurspegla arbeiðsmarknaðin

**– Tað er ikki uppgávan hjá ALS at loysa barnaansingartrupulleikar hjá sínum limum. Sum flest onnur, verða tey arbeiðsleysu eisini noydd at laga seg til arbeiðstíðirnar hjá stórum parti av føroyska arbeiðsmarknaðinum, sigur Elisabeth O. Gaardbo, stjóri á ALS**

ARBEIÐSLOYSI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Arbeiðstilboðini hjá ALS endurspegla í stóran mun ófaklærda føroyska arbeiðsmarknaðin, har ein partur av arbeiðinum er í skiftisvaktum. Tí verður tað ikki mett at vera ein serstøða, at fólk ikki hava barnaansinging uttanfyri vanliga upplatingartíð hjá ansingarstovnum. Hetta sigur Elisabeth O. Gaardbo, stjóri á ALS, í viðmerking til trupulleikan, at limir siga seg ikki kunna taka av ávísum arbeiðstilboðum, tí tey ikki hava barnaansing.



*– Tey arebiðsleysu verða noydd at laga seg til somu umstøður, sum øll onnur á arbeiðsmarknaðinum, staðfestir Elisabeth O. Gaardbo, stjóri á ALS*

### Mugu sjálvi finna loysn

Elisabeth O. Gaardbo kann ikki gera viðmerkingar til tey ítøkiligu málini, sum verða tikin upp í blaðnum í dag, men vísir á nakrar meginreglur, sum eisini umfata tær báðar kvinnurnar. Sambært stjóranum í ALS er hetta ikki ein vanligur trupulleiki, men hon ásannar, at tey renna seg í hann av og á, og tá eru sinnaði at geva fólki eina ávísa freist til at finna eina loysn. Men tað er ikki uppgávan hjá ALS at loysa ansingartrupulleikar fyri sínar limir, staðfestir hon.

– Meginreglan fyri at vera limur í ALS er, at tú ert tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Tí seta vit sum útgangsstøði krav um, at limir við smáum børnum hava barnaansing í vanligari arbeiðstíð. Samstundis verða tey kunnaði um, at tey sjálvi mugu finna eina alternativa ansingarloysn, um tey fáa eitt arbeiðstilboð, sum krevur tað, sigur Elisabeth.

Hon leggur afturat, at ALS ikki væntar, at fólk finna eina loysn á einum slíkum trupulleika eftir nøkrum fáum tímum. Men verður ongin loysn funnin innan rímiliga tíð, er ikki annað at gera, enn at geva liminum karantenu ella koyra hann úr skipanini, tí hann ikki kann metast at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

### Lítið uppsøkjandi arbeiði

Sum er, virkar ALS í høvuðsheitum sum eitt millumlið millum tey arbeiðstøku, og teir arbeiðsgevarar, sum venda sær til ALS. Spurd, hví ALS onki uppsøkjandi arbeiði ger, fyri at gera arbeiðstilboðini meir fjøltáttaði, sigur stjórin

– ALS hevur gjørt lítið við uppsøkjandi arbeiði. Hinvegin leggja vit orku í at førleikamenna okkara limir, so tey fáa fleiri møguleikar á arbeiðsmarknaðinum sum heild. Eitt nú arbeiða vit í løtuni við at menna júst arbeiðsávísingarøkið og tey førleikagevandi tiltøkini. Men tað vil altíð vera okkurt, tú kundi ynskt tær øðrvísi. Tað er sjálvboðið, um arbeiðsgevarar venda sær til okkum, men ynskiligt er, at fleiri nýta henda møguleika.

## Góð ráð til bátaeigarar

**Havn:** Nú tað líður móti vári, og alt fleiri bátaeigarir og siglarar gleða seg til at fara á flot og gera siglitúrar, er alneyðugt at eisini verður hugsað meira um trygdina umborð á bátunum. Tí skipar Tórshavnar Bátafelag fyri stórum tiltaki í Vágsbotni leygardagin kl.14.

Har verða fleiri ymisk tiltøk: Gummibátatænastan vísir, hvussu ein gummibátur verður útloystur, og onnur trygdarútgerð verður víst.

Høvi verður eisini at sløkkja eld við eldsløkkjara og brandteppi.

Bjargingarroynd við tyrluni og vaktar- og bjargingartænastuni er eisini á skránni, umframt tað at teldutøkna miðasavnið og streymkortið verða víst fram. Somuleiðis verður vegleiðing í fyrstuhjálp.

– Og so skal tað eisini verða hugnaligt at síggja alt hetta, so høvi verður at keypa sær ein drekkamunn við køkum og bollum, og sjálvandi eisini sodavatn til børnini, sum helst eisini fáa møguleikan fyri einum stimitúri, verður sagt í einum tíðindaskrivi.

Innkomni peningurin fer til at stuðla liðugtgerðini av tí teldutøkna streymkortinum og miðasavninum.

**sb.**